## Bert smávegis

Á Politistøðini hava tey merkt lítið til nógva vindin, sum hevur verið í nátt. Í hvussu er hava tey ikki fingið nógvar fráboðanir um skaða. Fýra vórðu tær tilsamans, og í trimum førum var talan um takplátur, sum vóru rivnar. Tvær av hesum fráboðanum komu úr Havn og ein úr Vági. Annars er bert ein onnur fráboðan komin, og hon snúði seg um okkurt smávegis á onkrum arbeiðsplássi, sigur vakthavandi á Politistøðini í Havn. Skaðar, sum verða uppdagaðir seinni út á morgunin verða vanliga ikki fráboðaðir løgregluni.



## Ilt við at koma at

Ljósið í stórum parti av bygdini í Nólsoy var farið í morgun, millum annað á molanum. Hetta førdi við sær, at atløguplássið hjá Rituni lá í myrkri. Hetta órógvaði so nógv, at tað gekst ógvuliga strilti hjá Strandferðslubátinum at leggja at. Fríska lotið, sum var, hjálpti sjálvandi heldur ikki til, og tað gekk meginparturin av einum korteri, áðrenn Ritan var komin at kei. Hinvegin var veðrið gott at sigla um fjørðin í morgun.

# Mátti koma frá Poul

**Vasið, sum uppstóð í morgun við útmeldingini hjá Poul Michelsen um »time-out« í ABC-samráðingunum, var altíð væntandi. Tað sigur ein av sigursharrunum hjá Fólkaflokkinum til valið, Annika Olsen**

SAMGONGUSAMRÁÐINGAR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Annika Olsen heldur tað vera býtt av Poul Michelsen soleiðis í sjálvdrátti at melda út á henda hátt. Men tað var, sambært henni, bert ein spurningur um tíð, nær tað hendi*

Poul Michelsen slepti einari lítlari politiskari bumbu í morgun, tá hann á heimasíðu síni mælti til eitt »time-out« í verandi samráðingum millum eina ABC-samgongu.

- Í samráðingunum við Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin var einki sum bendi á, at hesir flokkar vilja ganga Fólkaflokkinum á møti. Teir vilja ikki minka blokkin. Og verður ikki byrjað at minka blokkveitingina nú, skal ikki nógv fantasi tila t duga at rokna út, at ongin sjálvberandi búskapur verður 2015 ella nakað ár har í nánd, sigur Poul Michelsen á heimasíðu sínu.

Við útvarpið segði Poul Michelsen í morgun, at Fólkaflokkurin hevur skyldu til at royna aðrar leiðir. Hann vísir á, at flokkurin ikki fær tað burtur úr í verandi samráðingum, sum hann eigur.

- Skulu vit gerast sjálvbjargin í 2015 má blokkstuðulin tillagast í komandi samgongu, sum er helvtin av tíðini fram til 2015, segði Poul Michelsen við útvarpið.

Hann vísti somuleiðis á, at hann langt frá stóð einsamallur við hesi áskoðan í Fólkaflokkinum, og at tað eru mong í baklandi flokssins, sum stuðla honum.

### Vísir aftur

Jørgen Niclasen, formaður Fólkafloksins, vísir páståndunum hjá Poul Michelsen aftur. Hann sigur, somuleiðis við útvarpið, at floksfelagin als ikki kann vita, hvat gongur fyri seg í samráðingunum, heilt einfalt tí, at hann ikki hevur tikið lut í teimum.

- Tingbólkurin gevur ikki eftir og gevst í hálvum gekki. Politikkurin hjá flokkinum á sjálvstýrisleið er í stuttum at tøma yvirtøkulógina fyri málsøki, og at skapa Føroyum fíggjarligt frælsi, sigur Jørgen Niclasen við ÚF.

Men fyri at vinna fram á hesum máli er neyðugt við einari breiðari politiskari semju, og hon er møgulig við einari ABC-samgongu, heldur Jørgen Niclasen.

- Vit fara sjálvandi eftir at fáa so nógv sum til ber av okkara politikki við í eitt samgonguskjal, men tað fara hinir flokkarnir eisini. Og eg vænti ikki, at vit megna fíggjarligt frælsi í einari ABC-samgongu, men vit samráðast í løtuni, og hvussu hesar samráðingar fara at enda, ber av góðum grundum ikki til at siga, segði Jørgen Niclasen við ÚF.

Formaður Fólkafloksins sigur eisini, at fyri at fáa eina politiska semju er neyðugt við samráðingum, og tað vinnist einki í slíkum samráðingum við at brenna brýr, sum hann tekur til.

### Góðar vónir enn

Sosialurin hevur spurt ein av nýggju tinglimunum hjá Fólkaflokkinum, sum eisini hevur verið roknað at hoyrt til á sjálvstýrisvonginum í flokkinum, Anniku Olsen, um viðmerking til útmeldingina hjá Poul Michelsen.

- Hetta hevur bara verið ein spurningur um tíð. Eg havi vita hetta í einar tveir dagar. Men eg haldi, tað er ógvuliga býtt av einstaklingum at melda út á hendan hátt, sigur Annika Olsen.

Hon heldur eisini, at tað er ógvuliga óheppi at fara í fjølmiðlarnar á henda hátt, tí at fólk fara í sjálvdrátt kann bara skaða samráðingunum.

Og Annika Olsen hevur framvegis góðar vónir fyri hesum samráðingum, sum hon heldur hava gingið rímiliga væl.

- Vit hava nátt langt í samráðingunum, eisini á sjálvstýrisleið. Mann skal altíð hava góðar vónir í einari samráðingartilgongd, og tað havi eg eisini, sigur Annika Olsen.

Hon fór sostatt við góðum treysti aftur til samráðingarborðið klokkan tíggju í morgun.

Annars má staðfestast, at Poul Michelsen ikki í øllum førum hevur drigið somu línu, sum restin av Fólkaflokkinum í farna valskeiði, tá Poul Michelsen fleiri atkvøddi ímóti restini av samgonguni.